# ítróttur

Nr. 184 • týsdagur • 28. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Bronsa til fegna Heidi

**Støðið í ár er nakað væl hægri enn fyri fýra árum síðani, og tí var Heidi framúr væl nøgd, hóast úrtøkan í Athen gjørdist lakari, enn hon var í Sydney**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Seinastu kappingarnar hjá Heidi Andreasen vórðu á skránni fríggja- og sunnudagin, og her eydnaðist eiðisgentuni at vinna sær eitt bronsumerki.

Hetta kom til høldar fríggjakvøldið, tá hon gjørdist nummar trý í kappingini, 400 metra frá. Undan finaluni hevði Heidi næst bestu tíðina av finaluluttakarunum, men sæð burtur frá Jessica Long úr USA, sum var langt fremst, so var talan um sera tættar tíðir hjá hinum luttakarnum.

Og hesaferð eydnaðist so Heidi at halda seg innan heiðursmerkjarøðini. Heidi hevði tíðina 5.26,29, sum var væl betri enn fjórða plássið. Jessica Long hevði tíðina 5.07.88.

Seinasta kappingin hjá Heidi var so fríggjadagin, tá hon gjørdist nummar fýra í 50 metra firvaldssvimjing.



*Fríggjadagin megnaði Heidi Andreasen enn einaferð at vinna heiðursmerki til Føroyar, tá hon kom á mál sum nummar trý í kappingini, 400 metra frísvimjing*

Hóast úrtøkan í heiðursmerkjum sostatt ikki stóð mát við alt skreytið, sum hon fyri fýra árum síðani hevði við sær, so er einki at ivast í, at Heidi sjálv er framúr væl nøgd um avrikið.

Støðið í ymsu kappingargreinunum er hækkað sera nógv hesi seinastu fýra árini, og bara tað, at hon framhaldandi megnar at vera við millum tær fremstu, er ein stórur sigur fyri Heidi.

Hetta kom eisini greitt til sjóndar, tá hon fríggjakvøldið var at hoyra í Útvarpinum.

– Eg eri heilt ótrúliga vælnøgd, tí eg hevði ikki væntað mær nakað. Vit síggja, hvussu støðið er blivið ótrúliga høgt. Her eru so ótrúliga nógvar gentur, ið svimja bara so skjótt, segði føroysku bronsuvinnarin.

## Landsliðsleikarar í donskum felag

**Næstved/Herlufsholm hevur gjørt sáttmála við Heina Hanusarson og Gurið Mortensen í royndnum at stremba móti oddinum í Danmark**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er Lars Nedergaard, sum nú er venjari í felagnum, sum hevur gjørt av, at fáa Heina til felagið. Sagt verður, at hóast felagið undan hesum hevur ikki færri enn fimm lámar á liðnum, so verður roknað við, at Heini uttan iva verður ein styrkur hjá liðnum, og at fyrrverandi avrik hansara í TMS Ringsted og Ejby geva greðar ábendingar um kvalitet.

Mansliðið hjá Næstved/Hørsholm hevur í vetur ætlanir um at flyta upp í 1. deild í Danmark, og venjari hjá liðnum er Lars Nedergaard, sum fram til fyri stuttm var venjari hj føroyska manslandsliðnum.

Eisini Gurið Mortensen fer komandi árið at spæla í felagnum, har besta kvinnuliðið spælir í triðju deild. Sagt verður, at Gurið heilt greitt verður ein styrkur hjá felagnum, sum satsar upp á eina topp-plasering í deildini.



*Í Næstved verður roknað við, at Gurið verður ein greiður styrkur hjá liðnum, sum nú ætlar at vinna seg enn eitt fet móti donsku hondbóltstindunum*

# GÍ er á veg upp

**HB, sum leingi var á uppflytingarkós, hevur í fýra teimum seinastu umførunum ikki megnað at fingið fult**

3. DEILD
*Jóannes Hansen*

Inntil fyrst í hesum mánaðinum var tað einki, sum bendi á, at HB ikki heilt sannførandi skuldi vinna 3. deild og harvið flyta upp í næstbestu deildina. Hetta var síðsta av málunum hjá meistaraliðnum, sum skuldu røkkast í ár. Hini málini eru longu rokkin, og í summar bendi alt á, at hetta málið eisini skuldi røkkast.

Enn er møguleiki hjá HB at flyta upp. Men nú er sannlíkið fyri, at hetta skal gerast uttan endaspæl, rættuliga lítið. Sunnudagin var toppdystur í Gundadali. GÍ vann 1-0 á HB, og harvið eru gøtumenn undan síðsta umfarinum fremstir og besta evnið til uppflyting. Einasta málið skoraði Sámal Joensen, sum eftir at hava verið sjómaður eina tíð, nú er uppilagstur aftur. Í síðsta umfarinum skal GÍ spæla á heimavølli móti TB, sum longu er flutt niður í 4. deild. HB skal spæla í Runavík.

Gøtumenn hava bara tapt ein dyst. Tað var á heimavølli móti SÍ, sum vann 2-1. Fimm ferðir hava teir spælt javnt, og so hava teir vunnið hinar ellivu ferðirnar.

Í september mánað hevur HB spælt fýra dystir, uttan at tað hevur eydnast teimum at vinna. HB heimasíðan staðfestir eftir hesi avrikini, at næstbesta HB liðið er í kreppu.

Eftir 1-1 í Gundadali móti Skála og Fram taptu teir 5-1 í Sørvági, og nú taptu teir so móti GÍ. Rættuliga sannlíkt er tað altso, at GÍ fer at flyta upp, og at HB skal í endaspæl um eitt pláss í næstbestu deildini. Tað er greitt, at KÍ verður næstaftast í 2. deild. Tað vil við øðrum orðum siga, at klaksvíkingar og havnarmenn enn eina ferð skulu takast. Hesa ferð fer tað at snúgva seg um, hvør teirra skal vera í 2. deild, og hvør teirra skal vera í 3. deild í 2005.

Eftir brotssparkskapping vann HB leygardagin finaluna í 4. deild móti GÍ. Tað vil siga, at HB hevur tryggjað sær luttøku í 3. deild næsta ár. Um HB liðið í 3. deild ikki flytir upp í 2. deild, so verður tað GÍ, sum bæði fer at flyta upp í 2. og í 3. deild.

Allir fótbóltsspælarar og øll lið spæla fyri at vinna — hvørja ferð. Teir í 4. deild fegnast um at vinna, men teir eru neyvan sinnaðir at spæla í 3. deild. Hvørki teir í HB ella teir í GÍ. Talan er fyri stóran part um spælarar, sum hava tænt fyri seg, og sum nú ikki venja nakað serligt, men leygardagar hugna sær við at spæla fótbólt og kappast. Dystirnir í endaspælinum plaga at vera beinanvegin, tá ið landskappingin er liðug.





*Piotr Krakowski fekk leygardagin handað sjónliga prógvið um, at hann er besti B71'arin í søguni hjá felagnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Besti B71'arin

**Leygardagin fekk Piotr Krakowski handað minnisplátu, nú hann er kosin sum besti leikarin í søguni hjá B71**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hendan heiðurin hevur Piotr fingið, eftir at lesarar av heimasíðuni hjá B71, www.b71-sandoy.com, í vár fingu høvi at siga sína hugsan um, hvør av leikarunum hjá B71 hevur staðið seg best.

Hetta varð mest sum gjørt í kjalarvørrinum av UEFA-atkvøðugreiðslunum, har ymsu limalondini gjørdi av, hvør hevði verið teirra besti leikari tey árini, sum europeiska fótbóltssamgongan hevur verið til.

B71 hevði um sama mundið fingið nýggja heimasíðu, og ein av fyrstu tættunum her var, at lesararnir vórðu bidnir um at geva sína hugsan til kennar um besat B71'aran. Eftir eina tíð savnaði webmastarin so tey tíggju saman, sum vórðu oftast nevnd av lesarunum, og so bleiv ein quick-poll kanning gjørd á netinum.

Her endaði stóri pólverjin ovastur, og síðani hevur tað verið bíðað eftir einum høvi, har hesin heiðurin kundi latast Piotr.

### Kollvelti fótbóltin

Tað eru annars eini 16 ár síðani, at føroyingar fyri fyrstu ferð lærdu navnið, Piotr Krakowski, at kenna. Hetta var, tá B71 júst var komið upp í bestu føroysku røðina. Felagið hevði í eitt ár havt pólverska Jan Kaczynski sum venjara, og fyri at styrkja um hópin hevði hesin biðið tveir av landsmonnum sínum koma til felagið. Umframt Piotr var talan um Wiezlaw Zkrewsky, sum var málverji.

Og restina av søguni munnu tey flestu kenna. Snøgt sagt, so vóru teir báðir ein revolutión í føroyskum fótbólti, sum nú av álvara fekk at kenna, hvussu stóran mun útlendskir leikarar í veruleikanum kundu gera. Sjálvandi var tað ikki bara takkað verið teimum báðum, men teir áttu so sanniliga sín part av æruni fyri, at sandoyingar fóru ósigraðir ígjøgnum kappingarárið og fyri fyrstu – og higartil einastu – ferð gjørdust føroyskir meistarar í fótbólti.

Sjálvur helt Piotr á í B71 í fleiri ár. Bæði sum leikari og sum venjari, og eftir hetta hevur hann alla tíðina verið partur av føroyskum fótbólti. Sum venjari hevur hann millum annað verið í Vágum, í Fuglafirði og hjá B36, áðrenn hann tey bæði seinastu árini hevur verið á Eiði.

Úrslitini hava fyri tað nógva verið góð, og tó at talan gjørdist um niðurflyting við bæði FS Vágum og ÍF, so var skoðsmálið alla tíðina, at her var ein maður, sum við hepnari hond dugdi at fáa mest sum optimalt burtur úr tilfarinum, og í B36 var hann millum annað maðurin, sum førdi felagði til higartil einastu greipuna í felagssøguni.

Samanumtikið er einki at ivast í, at Piotr Krakowski er ein av teimum heilt stóru. Ikki bara hjá B71, men so sanniliga eisini í føroyskari fótbóltssøgu, og tað man frá teimum allar flestu vera sera væl unt, at hann nú kann seta minnisplátuna frá B71 millum hitt skreytið á hill sína.

## Sveinur er í Viborg

**Føroyski landsliðsmaðurin er upp á tal sum avloysari hjá felagnum, sum vil heilt fram í danska hondbóltsoddin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu tíðliga í vár skrivaðu vit á hesm síðum, at væl lýddi danski hondbóltsvenjarin, Ulrik Wilbek, hevði sýnt stóran áhuga fyri Sveini Justinussen og hondbóltsevnum hansara. Ikki minst eftir at Sveinur í útidystinum móti Noreg hevði havt eitt skoringsprosent upp á 100.

Talan gjørdist tó ikki um nakað ítøkiligt ta ferðina, og sjálvur helt Sveinur eisini alla tíðina fast um, at hann fyrst vildi gera seg lidnan á miðnámsskúlanum á Kambsdali.

Tann útbúgvingin er nú liðug, og síðani er áhugin fyri føroyska leikaranum bara øktur. Ikki minst nú Viborg eisini hevur mist ein av bakspælarum sínum, tí hesin skal skurðviðgerast.

Í løtuni er Svenur soleiðis til royndarvenjingar í felagnum, og av heimasíðuni, www.vhk.dk, framgongur, at venjarin sær stórar møguleikar í føroyska leikaranum.

– Hann er eitt stórtalent. Hann hevur tó ongantíð leikt uttan fyri Føroyar, so hann hevur ikki verið veruliga undir trýsti, so tað kann taka nakað av tíð. Men hann er avgjørt ein áhugaverdur leikari, sigur Ulrik Wilbek.



*Sveinur Justinussen roynir í løtuni at fáa sáttmála við Viborg í bestu donsku hondbóltsdeildini*

Og so kann leggjast afturat, at eydnast tað Sveini at fáa sáttmála í Viborg, so hevur skálamaðurin tikið eitt risa fet á hondbóltsleiðini. Higartil er tað annars einamest fyri kvinnuhondbóltin, at felagið hevur gjørt vart við seg, men seinnu árini hevur eitt stórt arbeiðið verið gjørt, fyri at toga menninar eins høgt upp. Millum annað er hetta gjørt, við at sera Wilbek sum venjara, og eftir at felagið í fjør flutti upp í bestu donsku deildina, eru teir í løtuni á triðja plássi í hesari, tó at tað enn bert eru leikt tvey umfør av kappingini.


MÓTTØKA

Í samband við stjóraskifti á Føroya Sjómansskúla verður almenn móttøka á skúlanum

hósdagin 30. sept. 2004
kl. 15.00 – 17.00.

Føroya Sjómansskúli
Maritime College